<u>**PLANTUPAKKI 2020**</u>



Alpurønn *Sorbus mougeotii*
Miðalstórt leyvfellandi træ. Tætt vakstrarlag. Grágrøn bløð. Nógvar, hvítar blómur og reyð ber. Harðbalin. Eingi serlig krøv til jørðildið. Líkist nógv Seljurønn, men er minni av vøkstri, og blómar og fruktar betur. Villini útbreiðsla: vestaru Alpufjøllini.



Japanskur lerkur *Larix kaempferi*
Stórvaksið leyvfellandi nálatræ. Nálirnar fagurgulan heystarlit. Best í djúpari, gloprutari jørð. Harðbalin, men veksur seint og krókut. Vælegnaður sum klipt, tøtt runnagirðing. Villini útbreiðsla: Japan.



Hyll / Ylliniviður *Sambucus nigra*
Hávaksin, harðbalin, leyvfellandi runnur. Tolir væl slitvind. Blómar væl, blómurnar hvítar. Fær vanliga ikki búgvin ber hjá okkum. Trívist best í léttari jørð og góðum sólargangi. Villini útbreiðsla: Evropa.



Bjarkarspiræa *Spiraea betulifolia*
Lágvaksin, leyvfellandi runnur. Reyðbrúnar greinar. Bløðini lík bjarkarbløðum. Hvítar blómur í tøttum klasaskjólum. Harðbalin. Trívist best í gloprutari jørð og góðum sólargangi. Villini útbreiðsla: Fjareystur.